# Greiður meiriluti vildi úr Føroya Arbeiðarafelag

**Á aðalfundi hjá S&K felagnum, sum er felagið skrivstovu- og krambafólki, 10. september var greiður meiriluti fyri, at felagið meldaði seg úr Føroya Arbeiðarafelag**

FAKFELAG

– S & K felagið vil boða frá, at á eykaaðalfundi felagsins á Hotel Hafnia 10. september var ein greiður meiriluti fyri at melda S & K felagið úr FA. Atkvøtt varð um málið, og 57 vóru fyri, 4 ímóti og 1 atkvøða var ógildug.

Soleiðis sigur nevndin í S & K felagnum, sum eisini takkar fyri tann stóra áhuga, sum limir felagsins vístu málinum. Nevndin veit ikki um nakran annan aðalfund, har so nógvir limir hava møtt upp. Nevndin tekur tað eisini sum eina stóra álitisváttan á nevndina, at meirilutin fyri uppskotinum frá nevndini varð so mikið stórur.

S & K felagið takkar Føroya Arbeiðarafelag fyri átta góð ár, og vilja tey vísa á, at teirra avgerð ikki er nøkur misnøgd við FA.

– Vit fara framhaldandi at stuðla FA í teirra arbeiði við at betra um korini hjá teirra limum. Eins og vit eisini vilja stuðla øðrum fakfeløgum, sigur felagið.



## Vilja betra korini hjá limunum

FAKFELAG

Nevndin vil gera eina viðmerking, til eitt úttalilsi hjá formanninum í FA, har hon heldur, at tað er nógv fyri, at hon skal hoyra tað frá eini skrivstovudamu, at S & K fer at hava eykaaðalfund um úrliman úr FA. Formaðurin veit væl, at nevndin í S & K hevði biðið um fund við nevndina hjá FA 18. august 2005, men tað lá ikki fyri hjá FA at møtast við S&K fyrr enn 1. septembur. Á hesum fundi var ætlanin at skráin fyri eykaaðalfundin skuldi fyrileggjast nevndini í FA, áðrenn tað fór út alment. Nevndin metti ikki, at vit kundu bíða til 1. septembur, av tí at høli var leigað og dato settur á nær eykaaðalfundurin skuldi verða. Tí sendu vit nevndini í FA skrivlig boð um eykaaðalfundin hjá S & K, soleiðis at hon var kunnað innan eykaaðalfundurin var almannakunngjørdur. Nevndin í FA var tann fyrsta, sum fekk at vita um eykaaðalfundin hjá S & K, sigur felagið, sum leggur afturat, at nú er tíð at hyggja frameftir.

– Øll fakfeløg arbeiða fyri at betra um korini hjá limum sínum, og tað hava vit í S & K gjørt við hesi avgerð, sigur nevndin í S & K felagnum.

**el**

## Lívstryggingin gjørdi munin

**Tað var serliga spurningurin um lívstrygging hjá limunum í S & K felagnum, sum var orsøkin til, at felagið gjørdi av at melda seg úr Føroya Arbeiðarafelag**

FAKFELAG

Eykaaðalfundurin hjá S & K felagnum byrjaði við at formaður felagsins greiddi frá, hví nevndin hevði tikið avgerð um at melda seg úr FA.

– S & K felagið er eitt stórt fakfelag, sum hevur sín egna sáttmála við FAG. Nevndin hevur sjálv gjørt samráðingaruppleggini eins og staðið fyri sáttmálasamráðingunum við FAG. S & K felagið hevur eisini sjálvt avgreitt ósemjur/trætur/ivamál, sum hava verið innan økið hjá S & K felagnum.

Nevndin í S & K felagnum hevur á nøkrum aðal- og tjakfundum hjá FA sett spurningar viðvíkjandi veitingunum úr lívstryggingarskipanini hjá FA. S & K hevur ikki verið nøgt við tær veitingar sum hava verið. S & K metti ikki, at svørini uppá spurninarnar vóru nøktandi og setti seg tí sjálvt í samband við ALKA, sum er tað felagið, sum FA hevur sínar lívstryggingar hjá, og við Føroya Lívstrygging. Hetta fyri at finna útav, hvat S & K sjálvt kundi bjóða sínum limum. Tey tøl sum komu fram, bæði frá ALKA og Føroya Lívstrygging, vóru munandi hægri, enn við verðandi skipan hjá FA.

S & K nevndin metti, at tilboðið frá Føroya Lívstrygging var betri enn tað frá ALKA og bjóðaði tí umboð frá Føroya Lívstrygging við á eykaaðalfundin til at hava eina framløgu um, hvat Føroya Lívstrygging kann bjóða S & K.

Tilboðið frá Føroya Lívstrygging varð samanborið við núverðandi skipan hjá FA.

Í dag fer helvtin av limagjaldinum hjá S & K til FA. Tað eru rættuliga stórar upphæddir, og metir nevndin í S & K, at tær tæna limunum best við at verða verðandi í S & K felagnum.

Uppskot er um at seta ein part av hesum limagjaldi í lívstryggingargrunn, soleiðis at tað er pláss fyri at betra um útgjøldini á hvørjum ári.

## Kvinnuráðgeving ávegis

**Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum hevur sett ein arbeiðsbólk, sum skal gera eitt álit um, hvussu ein kvinnuráðgeving kann skipast**

KVINNURÁÐGEVING

– Ætlanin er, at uppgávurnar hjá ráðgevingini í høvuðsheitum skulu fevna um upplýsing til ungar gentur og kvinnur um fyribyrging, ráðgeving til kvinnur, ið umhugsa fosturtøku, viðtalu við kvinnur, sum hava fingið fosturtøku, ráðgeving til barnakonur og stakar uppihaldarar, ið liva undir truplum viðurskiftum og hava tørv á stuðli, sigur Almanna- og heilsumálaráðið.

Ráðgevingin skal skipast við fakpersónum, sum kunnu veita kvinnum holla og neutrala fakliga ráðgeving í teimum ivaspurningum, sum tær hava av m.a. sosialum-, heilsuligum-, sálarligum- og/ella átrúnarligum slag. Ráðgevingin er ætlað sum eitt tilboð til kvinnur og dentur verður lagdur á, at tær sjálvar kunnu velja um tær ynskja at taka av hesum tilboði ella ikki, og hvønn part av hesum tilboði tær ynskja at velja. Tað vil siga, um tær ynskja at tosa við ein ella fleiri av ráðgevunum í toyminum. Endamálið við ráðgevingini er at veita kvinnum hjálp til sjálvhjálp, so tær verða betur førar fyri at taka avgerðir. Somuleiðis verður dentur lagdur á, at ráðgevingin verður ókeypis og anonym.

Landsstýrismaðurin hevur heitt á Almannastovuna, Landssjúkrahúsið, Heilsufrøðiskipanina og Kvinnufelagið um at velja umboð í arbeiðsbólkin. Arbeiðsbólkurin er mannaður við Berit Unn Petersen, sosialráðgeva, Anniku V. Dalsgarð, sosialráðgeva, Karini Dahl, ljósmóðir og Nicolinu Højgaard, heilsufrøðingi.

## Svend Auken vitjar

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í orkumálum, hevur boðið navnframa Svend Auken til Føroya at halda fyrilestur, í samband við, at arbeitt verður við at orða yvirskipaðan orkupolitikk fyri Føroyar. Mánadagin tann 26. september 2005 kl. 14.00 fer Svend Auken at halda fyrilestur í Norðurlandahúsinum um orku- og umhvørvisspurningar.

Hetta er annað árið á rað, Vinnumálaráðið skipar fyri fyrilestri um orku og umhvørvi í sambandi við arbeiðið at orða yvirskipaðan orkupolitikk og elveitingarlóg fyri Føroyar. Í fjør var tað navnframi Bjørn Lomborg, ið helt fyrilestur um orku- og umhvørvisspurningar í Norðurlandahúsinum.

Í ár hevur Vinnumálaráðið valt at bjóða Svend Auken, fyrrverandi orkumálaráðharra, hendan vegin, tí hansara áskoðanir á orku- og umhvørvi standa í andsøgn við tær hjá Bjørn Lomborg. Í fyrilestrinum fer Svend Auken at greiða frá sínum sjónarmiðum um grøna orku og umhvørvisvernd, umframt at greiða frá, hvussu ein væl skipaður orkupolitikkur kemur øllum pørtum í samfelagnum til gangs.

Svend Auken er føddur 24. mai 1943 í Århus. Hann er útbúgvin cand.scient.pol og hevur verið lektari við institutt- ið fyri statsvísind við lærda háskúlan í Århus frá 1973. Í árunum frá 1988 - 1992 var Svend Auken formaður í umhvørvisnevndini hjá teimum Evropeisku Sosialdemokratunum, og harumframt formaður fyri ST ráðstevnuni »Miljø for Europa« í Århus í 1998. Svend Auken er mest kendur um okkara leiðir sum danskur orkumálaráðharri, og hevur verið virkin javnaðarmaður í Danmark síðan miðskeiðis í 60'unum. Hann hevur verið arbeiðsmálaráðharri frá 1977 til 1982, umhvørvismálaráðharri frá 1993 til 1994 og umhvørvis- og orkumálaráðharri frá 1994 til 2001, somuleiðis hevur hann verið limur í formansskapi Fólkatingsins síðan 2001, umframt at hann hevur sitið í fleiri ymiskum nevndum og ráðum umboðandi danska javnaðarflokkin í orku- og umhvørvisviðurskiftum.

Aftaná fyrilesturin, ið verður ókeypis og opin fyri almenninginum, verður høvi hjá fólki í salinum at seta Svend Auken spurningar.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Vinnumálaráðið á tlf. 35 60 60 ella vmr@vmr.fo .

**Skrá fyri fyrilestur um orku og umhvørvi, sum verður í Norðurlandahúsinum tann 26. september 2005, kl. 14.00**

**Kl. 14.00**
Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í orkumálum, bjóðar vælkomin, og leggur fram fyribils uppskot til føroyska orkupolitikkin.
**14.30**
Svend Auken, fyrrverandi orkumálaráðharri, heldur fyrilestur um orku og umhvørvi.
**15.15**
Spurningar úr salinum.
**15.30**
Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, tekur saman um